# Nálabók



Tilfar :

- Toystykki (17 x 12cm) at brodera á
- Toystykki til fóður (16,5 x 11,5cm)
- Fliselin- at strúka á (16 x 11 cm)
- Filt - at seta nálirnar í (14 x 9cm)
- Broderingsnál við oddi
- Sentimeturmál
- Broderingsplast
- Broderítógv
- Strúkijarn og bretti



Klipp trý stykki :

Forstykki (17 x 12cm)
Fóður (16,5 x 11,5cm
Fliselin (16 x 11 cm )



Strúk síðukantarnar á forstykkinum 1cm inn



Trokkla við trillutráði eftir miðjuni



Trokkla plastið við trillitráði mitt á toyið



Klipp umleið 30 cm av broderitráði og tak 2 træðrir burturav at seyma við (tað eru 6 træðrir íalt ) og brodera stjørnuna mitt á forstykkið (tú byrjar ovast í vinstra horni )



Klipp plastið inn ímóti broderaðu stjørnuni og legg toyið í vatn til plastið er upployst. Legg at turka og strúk tað slætt.



Strúk fliselin á ranguna á fóðrinum



Seyma stykkini saman soleiðis : legg fóðrið niður á borðið (rættan vendir uppeftir – síðan forstykkið niður á fóðrið ( rættan vendir niðureftir )



Set nálir í og seyma runt um kantin ( lat eitt hol umleið 4 cm standa opið at venda bókini ígjøgnum ) Klipp skarð í hornini, so tað er lættari at venda bókini.



Vend bókini og seyma holið við hond. Strúk bókina slætta



Seyma ein pyntiseym runt um kantin



Klipp eitt filtstykki til at seta nálirnar í (14 x 9cm)



Legg filtið inn í bókina og seyma fast

Nøkur hugskot at brodera :



